# Kunngerð

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 11. september 2008 samtykti broyting í serstøku byggisamtyktini fyri Hvítanes.

Ætlaða broytingin er, at ásetingarnar í GR. 2, litra b,1 í serstøku byggisamtyktini fyri Hvítanes verða broyttar frá:

b. Eindirnar B. Sethúsabygging
1. Økini skulu einans verða nýtt til sethús og bygd mugu verða einans stakhús, ið standa fyri seg við í mesta lagi 2 íbúðum í hvørjum húsi.

Til

b. Eindirnar B. Sethúsabygging
1. Økini skulu einans verða nýtt til sethús og bygd mugu verða einans stakhús, ið standa fyri seg við í mesta lagi 2 íbúðum í hvørjum húsi og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús til eitt húski í hvørjari húsaeind.

Tilfar, sum lýsir ætlaðu broytingina liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum, frá 22. september til og við 14. oktober 2008, frá mánadegi til fríggjadag frá kl. 9.00 til kl. 16.00, hósdag tó til kl. 18.00.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða send Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 22. desember 2008.

**Tórshavnar kommuna**

Starvslýsing

Trivnaðartænastan

## Námsfrøðingar til Trivnaðartænastuna

Vit søkja eftir námsfrøðingum til Sambýlið á Líknargøtu, og Sambýlið og Bústovnin á Rúnarvegi í Runavík.

1) Søkt verður eftir 1 námsfrøðingi til Sambýlið á Líknargøtu, til setan frá 15.10.2008 ella eftir nærri avtalu.

2) Søkt verður eftir 2 námsfrøðingum til Sambýli/Bústovnin á Rúnarvegi til setan frá 01.11.2008

**Setunarviðurskifti**
Talan er um fulltíðarstørv og vera tey sett sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Setanarøkið er Nærverkið, og tænastustaðurin er fyribils á Sambýlinum á Líknargøtu og á Bústovninum og Sambýlinum á Rúnarvegi í Runavík.

Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, og roknast skal við morgun-, kvøld-, náttar- og vikuskiftisarbeiði.

Les meira um størvini á www.naerverk.fo / leys størv

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til leiðaran á tlf. 226121

**Umsókn**
Umsóknir við hjáløgdum próvskjølum, viðmælum og C.V. skulu sendast til:

Bústovnurin á Rúnarvegi 6
620 Runavík
Stílað: Oddfríða Højgaard, leiðari

**Umsóknarfreist: 04.10.2008 kl.12.00**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

Selja bilin?
– set hann í Sosialin!




Hevur tú ein bil til sølu, so er Sosialurin rætti miðilin at lýsa í.

Tú kanst lýsa við og uttan mynd.

Vit seta lýsingina upp fyri teg ókeypis.

Sosialurin
– blaðið øll lesa!

Sosialurin
Postboks 76
FO-110 Tórshavn
post@sosialurin.fo

# Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
Bergur á Reynatrøð

Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12

Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480



# Hús í Skálavík

Hús í Skálavík til sølu.
Nærri fæst at vita á tlf. 33 33 99.

# Íbúð ynskist

Íbúð ynskist til leigu í Havn frá 1. desember til eldri mann. Eri friðarligur og fari væl um.
Ring á tlf. 211322

TVØROYRAR KOMMUNA

# Tvøroyrar Kvøldskúli veturin 2008/2009

**Tvøroyrar Kvøld - og Ungdómsskúli bjóðar í vetur hesi skeið fram**

**FRÍTÍÐARUNDIRVÍSING**

| **Lærugrein:** | **Tilmelding hjá** | **Tlf.** |
|---|---|---|
| **Hondarbeiði** | Lena Jensen | 372150 |
| **Veving** | Óluva Joensen | 371001 |
| **Máling/tekning** | Palle Julsgart | 371669 ella 371976 |
| **Matgerð** (Klænkikostur) | Tina Midjord | 371962 |
| **Fyrstahjálp** | Naja Mortensen | 371567 |
| **Tónleikur:** Hornblástur | Tróndur Enni | 256699 |
| Guitarspæl | Trygvi Strøm | 261443 |
| **SRC/ROC-VHF-skeið** | Don Petersen | 591196 |

**UNDIRVÍSING Í TELD:**

| | | |
|---|---|---|
| **Tekstviðgerð** | Heri Thorsteinsson | 371632 ella 571632 |

**VENJINGAR Í HEITUM VATNI**

| | | |
|---|---|---|
| **Giktasvimjing** | Marjun Olsen | 371642 |
| **Bridge** | Einar Larsen | 228241 |

Øll undirvísing er treytað av nóg stórari luttøku og góðkenning av myndugleikunum.

**Tvøroyrar Kvøld- og Ungdómsskúli · tlf. 371582**